Søkir verður eftir

**LÆRARA TIL DATANOM-TELDUSTØÐINGAÚTBÚGVINGINA**

Teldustøðingaútbúgvingin er ein hægri, vinnurættað og teldunýtslufrøðilig fulltíðarútbúgving. Kravið at verða upptikin er, at tann lesandi hevur miðnámsprógv. Datanomútbúgvingin er ein stakgreinaútbúgving fyri etv-fólk í vinnuni.

Teldustøðingaútbúgvingin hevur verið á skúlanum í 2 ár og 21 lesandi hava tikið prógv sum teldustøðingar. Tey lesandi, ið nú ganga verða liðug í januar 2002. Nýggjur flokkur byrjar august/september í ár.

Vit eru nakað illa mannaðir í løtuni á hesum øki. Søkt verður tí eftir lærara, sum kann undirvísa í systemmenning, -menningarhættum, -strategi, og KT í virkinum. Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um at ráðleggja, reika fyri og fremja undirvísingina. Herumframt kann verða talan um at serligar uppgávur so sum at gera eina verkætlan, próvtøkuuppgávur, gera ársætlan, lestrarvegleiða og høvuðsuppgávuvegleiðing.

Kravið til tín er, at tú hevur breitt teldufrøðiligt bakstøði við viðkomandi hægri útbúgving og hevur vinnuroyndir á økinum. Tú skalt verða til reiðar í tøttum samarbeiði við aðrar lærarar í útbúgvingini at taka lut í tvørfakligari og prosjektrættaðiri undirvísing. Verða sinnaður at fylgja við tí skjótu fakligu og undirvísingarligu menningini á økinum.

Byrja sum skjótast ella eftir avtalu. Nærri fæst at vita frá skúlanum á telefon 317177 ella telduposti hsh@hsh.fo

Umsókn við avritum av prósvkjølum o.ø., skulu sendast til stjóra skúlans Ragnar Magnussen, Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegur 77, Postmoga 177 og verða skúlanum í hendi 14. februar 2001.

*Á Føroya Handilsskúla fevnir frálæran um FHS-støðisár, FHS 2.part, hægri handilsskúla, stakroyndir, merkonom, Datanom, teldustøðingaútbúgving, HD 1. part, peningastovnaskúli og útboðin/umbiðin skeið.*

FØROYA HANDILSSKÚLI
Tel: 317177, Fax: 313374

**Eysturoyar Røktar- og ellisheim**

**620 Runavík**

**Søkir:**
**Sjúkrasystir 0,5 tíð** at byrja **01.03.01 – ella eftir nærri avtalu.**

**Sjúkrasystir 0,5 tíð** fyri tíðarskeiðið **01.03.–31.08.01.**

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálstýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya.

Nærri upplýsingar størvunum viðvíkjandi fæst við at venda sær til deildarleiðaran á Norðstovu ella fyristøðumannin, tlf. 448185 ella tlf. 448201.

Umsókn við avriti av prógvi v.m. verður at senda til

**Eysturoyar Røktar- og Ellisheim**
att.: fyristøðumaðurin
620 Runavík

Umsóknin skal vera móttikin í seinasta lagi 17.02.2001

BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

Original bosal Útstoyt



p/f Esmar Simonsen
Kambsdalur
FR-530 Fuglafjørður
Tlf. 444405
Fax444629

i
Sosialurin



eyðun nolsøe & terji rasmussen
**eitt nummar... og seytjan onnur**
1 eros 2 tú 3 nummar 4 80'ini 5 lívið er okkara gáta 6 mítt land 7 ljóðmynd 8 dansa 9 handan mjørkan 10 tey dansa eins og skuggar 11 hvussu kann eg vita? 12 sjalusi 13 eg flýggi til tónleikin 14 maria 15 skuggar yvir peking 16 gerandislag 17 morgunflog 18 afrodite
3arin
SMS - tel 35 35 35 - fax 35 35 36 - e-mail: tryarin@post.olivant.fo

*Undirvísingar- og Mentamálastýrið*

**SJÁLVLESANDI**
**Innskriving til students-/HF-próvtøku**

Sjálvlesandi, herundir umgangarar, ið á sumri 2001 ætla sær til students- ella HF-próvtøku, skulu í seinasta lagi 25. februar 2001 innskriva seg til próvtøku við tann skúlan/tað skeiðið, har tey ætla sær til próvtøku.
Innskrivingarblað at fylla út fæst frá studentaskúlunum og HF-skeiðunum.

Sjálvlesandi skulu rinda 300 kr. fyri hvørja lærugrein, tey innskriva seg til próvtøku í.

Tá ið tann sjálvlesandi hevur verið til próvtøku í tí/teimum lærugrein/um, hann/hon hevur innskrivað seg til próvtøku í, fær hann/hon pengarnar aftur.

Undirvísingar- og Mentamálastýrið ger vart við, at próvtøkan verður hildin sambært ásetingunum í tí nýggju studentaskúla- og HF-skipanini.

*3. februar 2001*

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**

Sosialurin




ítróttur
Nr. 24 • leygardagur • 3. februar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Steypafinalan órógvar

**Eftir ætlan skuldi steypafinalan spælast um vikuskiftið. Hendan er sum kunnugt flutt, og tí er eingin dystur í bestu kvinnudeildini á skránni um vikuskiftið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Talan verður tó um ein kvinnudyst um vikuskiftið, tí seinasti luttakarin til komandi leygardag er enn ikki funnin.

VB fer við eini fimm mála stórari leiðslu til Klaksvíkar, men nógv bendir á, at tær kunnu fáa sera trupult við at varveita hesa leiðslu. Sálarliga vigar tað helst tungt, at Stjørnan koppaði øllum á høvdið suðuri í Vági fyri viku síðani, og harafturat er liðið meint rakt av skaðum og leikbannum. Sólrun Krosslá og Rannvá Augustinussen hava báðar brotið armin, og harumframt hevur Gurið Mortensen leikbann, so torført verður tað. Undir øllum umstøðum kann tó roknast við, einum sera spennandi dysti, tá liðini fara á vøllin leygardagin.

Dysturin verður spældur kl. 17.00.

## Ein mansdystur

At steypafinalan varð flutt, komst av, at U-21 landsliðið skuldi uttanlands at spæla. Tískil ber heldur ikki so væl til at flyta dystir til hetta vikuskiftið, men í einum føri er hetta so gjørt.

Hvørki VÍF ella H71 hava leikarar á unga landsliðnum, og hesi bæði liðini hittast í Vestmanna sunnudagin, Einki er at taka seg aftur í, at vestmenningar eru greiðir favorittar at vinna dystin, og hópurin er somikið breiður, at missurin av Inga Olsen (leikbann) ikki skuldi verið ógjørligur at borið.

# Bronsudystur ?

**Hjá kvinnunum verður eingin beinleiðis oddadystur hetta vikuskiftið, men leygardagin møtast liðini, sum hava ætla sær bronsuna.**

FLOGBÓLTUR, KVINNUR

Tá tekur ÍF ímót TB kl. 13.00 á Kambsdali. Dystirnir higartil í á hava verið spennandi — onkur 3-2 — men við tí leikstyrki sum TB vísir í løtuni, so kann roknast við at tær hava munin, men ein skal ongantíð avskrivað fuglfirðingarnar.

## Mjølnir favorittar

Sunnudagin møtast Mjølnir og Fleyr kl. 15,00 í KÍ-høllini. Fleyr er við at uppbyggja eitt nýtt lið, og hevur ikki víst tey góðu úrslitini higartil, meðan Mjølnir sum altíð liggur í oddinum. Og seinasta vikuskiftið vunnu klaksvíksingarnir eisini 3-2 ímóti hinum oddaliðnum Drátti.

Kl. 13.00 sunnudagin skal Fossanes leika ímóti Drátti, men uttan at taka munnin ov fullan, kunnu vit siga, at eftir úrslitunum higartil, verður tað vágaliðið, sum vinnur henda dystin. Fossanes, sum fyri fyrstu ferð leikar í meistaradeildini, hevur higartil bert vunnið eitt sett, og tað er ikki tað besta at fara á vøllin við ímóti einum av oddaliðunum.

# Spenningur í Klaksvík og á Kambsdali

**Sunnudagin verður kanska dagurin, tá FM-gullið hjá monnum verður avgjørt**

FLOGBÓLTUR, MENN

Hetta vikuskiftið kann verða avgerandi fyri, um ein kann ávísa eitt einstakt lið sum kandidat til føroyameistarheitið 2001 hjá monnum.

Við tað at vikuskiftið er dupult hjá fleiri av mansliðunum, – leika bæði leygardag og sunnudag — kann nógv óvæntað fara fram.

Leygardagin kl. 14,30 møtast Mennnir hjá Mjølni og Fleyr. Mjølnir hevur onkran dyst havt trupulleikar av havnaliðnum, men í ár hava teir í flestu førum havt munin, hóast at klaksvíksingarnir taptu ímóti Fleyr í Mjølnirkappingini. Fleyr tapti seinasta vikuskiftið 3-1 ímóti Fram, men tað var við einum skerdum liðið, við tað at Johannes Ejdesgaard og Jan Hentze ikki vóru við. Men samanumtikið má sigast, at oddaliðið higartil má sigast at vera tað besta boðið upp á ein vinnara í Klaksvík leygardagin.

## ÍF á Kambsdali

Næstfremsta liðið ÍF skal leygardagin kl 15,00 leika ímóti Fram á Kambsdali. Fram hevur higartil ikki víst tað, sum ein hevði roknað við í ár, men seinasta vikuskiftið vunnu teir ímóti Fleyr sum sagt 3-1. Men ÍF hevur framvegis gullið í eygsjón, so ein kann rokna við, at Bartal Eliassen og Boban ikki yvirgeva seg uttan dyst.

## Aftur sunnudagin á Kambsdali

Sunnudagin kann tann stóra avgerðin falla. Tá skulu bæði oddaliðini møtast á Kambsdali. Hetta verður ímillum ÍF og Mjølnir kl. 15,00. Tá kann roknast við einum rættuliga spennandi dysti, har millum annað jugoslavisku tvíburðarnir Boban og Borco skulu møtast, fyri at prógva hvør teirra hevur gjørt tað betra arbeiði við teirra liðum.

Hetta verður eisini ein roynd uppá sjálva steypafinaluna, sum verður verður í høllini á Hálsi í Havn tann 17. februar.

So her verður spenningur fyri allar pengarnar.

# Aftur til Arsenal

**Um tvær vikur fer 15 ára gamli Ingi Højsted enn eina ferð til Arsenal, har hann áður hevur vant**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



Um 15 ára gamli havnardrongurin, Ingi Højsted, í løtuni hevur ilt við at hugsa um skúlating og onnur gerandislig ting, so er tað kanska ikki so løgið. Í øllum førum kemur tað ikki hvørjum unglingi til lut, at bæði PSV Eindhoven og Arsenal vilja hava teir til sín at venja, men hetta er júst støðan hjá Inga.

Um tvær vikur skal hann til Arsenal, har hann áður hevur verið og roynt seg, og eftir einar tvær vikur heima, skal hann aftur av landinum. Tá gongur leiðin til PSV Eindhoven.

Tað er Jákup í Stórustovu, sum er umboðsmaður hjá Inga, og sum skilst, so verður talan helst um ein minningaríkan túr hjá leikaranum. Umframt at venja, skal hann ætlandi spæla nakrar dystir við U-15 liðnum hjá Arsenal, og harumframt fær hann eisini høvi at síggja tveir dystir í tveimum av heimsin mest kendu steypakappingum. Fyrst er tað enski FA-cup dysturin millum Arsenal og Chelsa, sum er á skránni, og seinni dysturin millum Arsenla og Lyon í europeisku meistarakappingini.

At Ingi í fyrsta umfarið fekk møguleika at koma uttanlands komst av, at hann er partur í eini samlaðari ætlan, har Jákup í Stórustovu hevur arbeitt við at senda nakrar útvaldar ungar fótbóltsleikarar til ymisk útlendsk feløg á sonevndum venjingaruppihaldum. Stuðlar aftan fyri ætlanina hava verið Føroya Sparikassi, Tryggingarfelagið Føroyar, Atlantic Airways og Føroya Shell.